# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyar í Europa í fokus

Ræettiligt glið er komið á almenna kjakið rundan um støðu Føroya í europeiska samveldinum. Nú tykjast bráddliga flestu flokkar og politikarar hava eina ella aðra avgjørda meining um viðurskifti okkara til ES.

Og meiningarnar eru fleiri. Landsstýrið hevur lagt seg eftir at royna EFTA kortið, tó at mong geva tí lítlan kjans. Kortini eru sterkar røddir í samgonguni, her ikki minst í Sambandsflokkinum, sum vilja hava landsstýrið at sleppa EFTA-leiðini men heldur fara beinleiðis inn í samráðingar við ES um eitt ella annað slag av limaskapi.

Tjóðveldi hevur eisini markerað seg nógv í hesum málinum. Og teirra støða er greið. Tað ber ikki til at søkja um limaskap í ES soleingi vit eru ein partur av danska ríkinum.

Tað skortar so heldur ikki við upplýsing og kjaki í hesum døgum um nettupp framtíðar støðu Føroya í Europa. Í annaðkvøld skipar Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi fyri fyrilestri og kjaki um europapolitikk føroyinga. Professari í altjóðarætti og ríkisrætti, Ole Spierman, leggur fram løgfrøðiligt upprit um Føroya rættarligu støðu mótvegis ES, EFTA og EBS og ger sínar metingar um, hvørjir møguleikar eru og hvat krevst, skulu Føroyar søkja um limaskap í einum av hesum skipanum. Hetta verður í Miðlahúsinum mikukvøldið. Og í viðmerkingunum til fundin stendur m.a.: "Onkur tosar í eystur um ES limaskap og tey sonevndu "fýra frælsini". Ein annar svarar í vestur um EFTA-limaskap. Ein triði tosar um eina EBS-skipan, sum Noreg, Ísland og Liechtenstein hava við ES, har tey eru partur av teimum fýra frælsunum, uttan at verða limir í ES. Boðini eru mong, men ber tað til hjá Føroyum at velja millum hesar møguleikar í núverandi ríkisrættarligu støðu? Hvat krevst, um føroyingar skulu royna aðra ella hina leiðina?"

Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi hevur sett sær fyri at lýsa og greina nakrar av teimum mongu og fløktu spurningunum, ið hava týdning fyri altjóða samstarv Føroya mótvegis europeisku skipanunum. Sum nakað nýtt fer Rás2 at gera eina roynd at senda tiltøk í Miðlahúsinum beinleiðis til alt Føroya fólk. Hetta verður mikukvøldið klokkan 19.

Sama dag sum hetta tiltakið verður kemur danski uttanríkisráðharrin Per Stig Møller á almenna vitjan, og hann fer m.a. at umrøða sama mál, Føroyar og ES. Í hesum sambandi tekur fólkatingsmaðurin Edmund Joensen í bløðunum í dag enn einaferð blaðið frá munninum og skrivar, at vitjanin hjá Per Stig Møller, uttanríkisráðharra, er eitt gylt høvi hjá landsstýrismanninum í uttanlandsmálum at byrja tilgongdina, har Føroyar og Danmark í felag finna eina smidliga loysn á føroyska ES-spurninginum.

Á Grækarismessu verður so eisini skipað fyri stórari ráðstevnu um Føroyar í Europa, har m.a. fyrrv. norski uttanríkisráðharrin Thorvald Stoltenberg vitjar.

Ikki kann sigast annað enn, at hetta evnið hevur stóran áhuga millum føroyingar og fer helst at vera við til at seta dagsskránna í politisku skipanini og alment í komandi tíð.

**Sosialurin**

## Hvat gera okkara politikarar, sum er positivt?

**HERGEIR STAKSBERG**
hrgar@hotmail.com

Eg havi tað við politikarum, sum við eini gamlari vittigheit. Vittigheitin er um ein mann, har alt er negativt og tað einasta, sum er positivt, er hansara hiv test. Henda vittigheitin hevur tveir paralellir til okkara politikarar, tí tað er ótrúliga torført at finna fram til nakað positivt frá teirra síðu, umframt at teir í nógvum førum føra seg fram sum vittigheitir.

Eg havi roynt at lagt høvdið í blot viðvíkjandi, hvat politikararnir í Føroyum hava avrikað seinastu tíðina. Niðanfyri havi eg gjørt ein lista yvir ”avrikini”, sum eg havi fest meg við.

**1)** Hoyvíkssáttmálin, sum hvørki kann brúkast til eitt ella annað.

**2)** John Johannesen og Annika Olsen lovaðu tónleikinum betri kor, hóast onki er hent.

**3)** Á valfundi í SVF lovaði Jørgen Nclassen, at skúlin á Trøðni skuldi fáa ein nýggjan svimjihyl.

**4)** Ein væl gjøgnumhugsað rundstykkjalóg varð løgd fram.

**5)** Ein fantastiskur undirsjóvartunnul leggur Føroyar lamið í næstan eitt ár.

**6)** Tobbi var so óheppin, at hann datt um ein stein og á leiðini endaði ein joint av óvart í munnklovanum. Eitt var so heilt sikkurt, at tað var ikki við vilja, at Tobbi hevði roykt hash.

**7)** Karsten Hansen roynir at minka blokkin við 185 milliónum, samstundis sum hann absolut ongan møguleika sá fyri at geva pensionistunum meir pengar... pluss at kreppa var ávegis.

**8)** Uppskot til at bryggja sterkt bleiv felt, hóast loyvt er at keypa sterkt. Nakar, sum veit hvat henda diagnosan kallast?

**9)** Ein ávísur maður fær nýggja karrieru sum lásasmiðjur.

**10)** Fíggjarmálaráðharrin drekkur seg skít í Íslandi.

**11)** Politikarar renna avstað við møblum, heldur enn at geva teir til t.d. ALV.

**12)** Tað er onki problem at donera milliónir til Smyril Line, samstundis sum kreppa er væl ávegis í Føroyum.

**13)** Tað er heldur onki problem at donera 300 milliónir til Íslands, samstundis sum kreppa er væl ávegis.

**14)** Bill roynir at avskaffa talufrælsið, samstundis sum hann verður høvuðsorsøkin til at hash fær nógva meir umtalu/ reklamu í fjølmiðlunum.

**15)** Anfinn Kallsberg úttalar seg ógvuliga intelligent um "akademikarar í Havn". Hvat skal mann eisini við akademikarum sum Albert Einstein, Karl Marx, Isaac Newton osfr?

**16)** Tingfólkið fer tíðliga til hús, tí tey skulu avheinta børn.

**17)** Lata íslendarar yvirtaka okkara arbeiðsvirksemi og harvið gera tað eyka trupult at fáa tingini at mala runt.

**18)** 10. min. av eini ENDURSENDING fáa alt landið upp á gos! Og enn einaferð regnar tað svávul yvir paradísið Føroyar. Hetta fær somuleiðis 26 tingfólk at savna undirskriftir saman og mótmæla, hóast minus á fíggjarlógini setur dagsskránna. Prioriteringarnar vísa enn einaferð, at har er skil á.

**19)** Spara útbúgving til framtíðina, tí kreppa er.

**20)** Byggja tunlar, tí kreppa er.

**21)** Skerja dagtilhald til pensjonistar, men savna undirskriftir til eina endursending fyri pensjonistar.

**22)** Johan Dahl proklamerar, at hann hevur verðins lættasta starv og nevnir m. a., hvussu lítlan innsats starvið krevur og hvussu nógva frítíð hann hevur. Hetta sigur hann, hóast landið hevur fúlt minus á fíggjarlógini. Kanska blandar Johan við hugtakið: ”at taka sær av løttum”. Hví kunnu øll ikki hava sama eldhuga og entusiasmuna?

**23)** Tjóðveldi hevur ferð eftir ferð víst, at konsekvensir fyri samfelagið eru sekundert, bara teir fáa (út)loysing. Og onkursvegna hava øll í flokkinum ein Nostradamus í búkinum, tí tey hava merkiliga góð evni at spáa um framtíðina. Og teir tosa gud hjálpi tú mær enn um flaggið, føroyska málið og fólkaatkvøðuna. Tað er ca. tað sama sum at fólk enn romantisera DOS skipanina, framum Windows... kom víðari! Her hevur trúgv meir at siga enn fakta, og er mann ikki samdur við tjóðveldi, so er mann pessimist, konservativur, ábyrgdarleysur, grenj, mammudrongur og blablabla.

**24)** Sambandsflokkurin er lítið frægari.Teir vilja ikki hava nakrar sum helst broytingar, men dúva hinvegin upp á fortíðina og tilbiðja status quo. Tað riggar fínt sum tað er, hví skulu vit broyta nakað? Vit hava ongan tørv á at menna okkara land tralalala. Kanska ikki so merkiligt, at Johan Dahl sigur hetta vera verðins lættasta starv. Har er ongin visjón av nøkrum slag, men heldur hevur blackmail via ríkisfelagsskapin nógv meir at siga. Einasta visjónin, sum eg dugi at fáa eyga á, er, at teir vilja kjakast um ES, men hetta hava teir sagt í áratíggju, so langa tíð kann eitt ES kjak ikki taka.

... og nú hava vit eitt hall upp á hálva milliard og politikararnir gera akkurát onki fyri at betra um støðuna. Mann kann siga nógv um Ísland, men á hesum økinum er íslendska fólkið ljósár framman fyri Føroyar. Hasir politikararnir høvdu so ikki fingið frið í Íslandi! Umframt, at politikararnir í Íslandi byrjaðu við at skera av teirra egnu útreiðslum, tá kreppan kom, men um vit skulu gera tað sama í Føroyum, so merkir hetta jú, at tað fer at ganga útyvir verðins lættasta starv… uha uha… åh det horror! Nei, á hasum økinum hava sjálvt maðkar meir rygg.

Vælvitandi um, at tað onga meining gevur at skriva hetta lesarabrævið, tí minnið er sum hjá einum gullfiski, men eg geri eina roynd hóast alt. Hvat við at droppa loysing, samband og Jesus eina løtu og fokusera upp á veruligu trupulleikarnar? Hvat við at skapa betri kor fyri vinnurnar, venda hall til vinning á fíggjarlógini, geva teimum eldru virilig kor, gera okkurt við at sjúkrahúsið er undirmannað, óskilið viðvíkjandi fróðskaparsetrinum, mentan osv.?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.